


**TRYGT**

*Nógv vandamikil vegamót eru í Tórshavnar kommunu. Eitt teirra er her við innkoyringina í nánd av kirkjuni í Kollafirði. Nú ætlar kommunan at bæði vegir, gonguгøtur og vegamót skulu gerast trygg. – Neyðugt er at gera eina ferðslutrygdarætlan, og ikki arbeiða frá bungu til bungu, sigur Marin Katrin Frýdal, forkvinna í teknisku nevnd.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Fokus skal somuleiðis setast á lógarverkið innan ferðsluviðurskifti og byggisamtyktina hjá kommununi, eins og tað er ynskiligt hjá umsitingini at hava eina vegahondbók, sum tekur støði í vegabygging grundað á galdandi vegtekniskar normar.

Tá ið ferðslutrygdarætlanin er liðug, verður ein heildarætlan løgd yvir hvørji innsatsumráðir arbeiðast skal víðari við og hvørji lokal tiltøk skulu takast í nýtslu fyri at betra um ferðslutrygdini.

- Lidna ferðslutrygdarætlanin skal fyrst góðkennast av teknisku nevnd og síðani av býráðnum. Men tá er grundstøðið lagt at kunna ráðgeva, eins og á uppskot, leiðbeining og viðmerkingar frá borgarum í kommununi.

*snorri@sosialurin.fo*

## Eg leggi haraftrat serligan stóran dent á, at tú við eini slíkari ætlan hevur møguleika at viðgera øll og allar borgarar, býlingar og bygdir eins

MARIN KATRINA FRÝDAL

# Mín ringa samvitska

**FERÐSLUTRYGD** - Nei, eg má bara viðganga at tað er ikki hent tað stóra í hesum málinum, sigur Boði Haraldsson, býarverkfrøðingur í Tórshavnar Kommunu í stuttari viðmerking við Oyggjablaðið

Snorri Brend

Tórshavnar kommuna, og sum Kollafjørður gjørdist partur av 1. januar 2001, stendur fyri nógvum avbjóðingum, eisini á tí økinum sum eitur ferðslutrygd.

Boði Haraldsson *(myndin)* er tó heilt erligur og viðgongur, at júst hetta arbeiðið í Kollafirði hevur ikki verið nóg nógv raðfest.

- Hetta er mín ringa samvitska, staðfestir hann.

Ein orsøk til hetta er, at ein hevur vantað eina serstaka ætlan fyri ferðslutrygdina í kommununi, og herundir sjálvandi eisini Kollafjørð. Ein ískoyti til hetta tjakið finst aðrastaðni í hesum Oyggjablaðnum.

Ein slík ætlan fer at leggja tær stóru linjurnar fyri ferðslutrygdina, men sjálvandi er ikki alt gjørt bert við eini ætlan.

- Neyðugt er eisini við resoursum, sigur Boði Haraldsson, býarverkfrøðingur. - Spurningurin er hinvegin, um tað skal kosta so øgiliga nógv fyri at tálma ferðsluna.



### Okkurt má gerast

Borgarstjórin, Heðin Mortensen segði seg skilja umstøðurnar hjá kollfirðingum, tá teir handaðu honum unirskriftirnar í november 2006 *(sí aðra grein)*.

Hann var sinnaður at taka málið upp við umsitingina í býráðnum, og at hitta stigtakararnir aftur til ein fund rímiliga skjótt.

Eitt slíkt mál sum hetta hoyrir natúrliga heima í teknisku nevnd, men ferðslunevndin verður sjálvandi eisini ein týðandi partur í viðgerðini av hesum máli.

Hann skuldi beinanvegin fara at útvega sær eitt yvirlit yvir bygdirnar og vegirnar í økinum, og síðani var ætlanin at tosa saman aftur.

- Tað eru jú tit sum vita, hvar trupulleikarnar eru. Okkurt má í øllum førum gerast her, segði borgarstjórin við ídnu kollfirðingarnar í november 2006.



**UMKOYRING**

*Sum sæst á hesi tekningini hjá Landsverki, skal ætlaði umkoyringarvegurin byrja við rundkoyringina í Kollafjarðardali*

# Ein veg uttan um bygdina

Sambært Samferðsluætlanini hjá Landsverki fyri árini 2008 til 2020 finst ein ætlan um ein umkoyringarveg um Kollafjørð.

Talan er um eina útbygging av høvuðsvegakervinum, har ein leggur hesa umkoyringina um bygda økið Inni í Firði, ístaðin fyri høvuðsvegin sum í løtuni verður brúktar av omanfyri 4000 bilum í miðal um samdøgrið.

Ætlaða arbeiðið er mett at taka trý ár og skuldi á sinni kosta 25 mió krónur. Einki varð tó sagt um, nær byrjast skuldi.

**sb.**